# Rie ER NÝGGJA DANSKA STJØRNAN

27 ára gamla Rie Rasmussen er rættiliga á veg fram í filmsheiminum. Danska kvinnan er annars kenda fyri sína yrkisleið sum modell hjá Eileen Ford í New York, men hon brennir rættiliga fyri filmsídnaðinum, og hon hevur longu roynt at gera film sjálv og at spæla við.

Nú spælir hon høvuðsleiklutin í nýggja filminum hjá kenda franska leikstjóranum Luc Besson. Filmurin kallast Angel-A og er fyrsti filmur, sum Besson ger síðani Jeanne d'Arc í 1999. Stórur spenningur er um filmin, og tað er komið fullkomiliga óvart á tey flestu, at Besson hevur valt tað 184 sentimetrar høgu Rie Rasmussen til høvuðsleikltuin. Hon spælir saman við kendasta skemtaranum í Fraklandi.

Rie hevur áður spælt við í filmi, tí hon hevði ein nógv umrøddan leiklut í filminum Femme Fetale hjá Brian de Palma í 2002.

Rie Rasmussen tók øll á bóli, tá ið hon í 2004 kom til Cannes við sínum egna stuttfilmi, Thinning the Heard, sum júst Luc Besson hevði hjálpt henni við.

Nú samstarva tey aftur, men tað er í einum nýggjum stórfilmi hjá Luc Besson, sum varð frumsýndur í síðstu viku.



*Rie Rasmussen er 27 ára gomul, og hon spælir við í nýggja stórfilminum hjá franska leikstjóranum Luc Besson, sum áður hevur gjørt filmar sum Nikita, Jeanne d'Arc og Leon*



*Rie Ramussen saman við Rebecca Romijn-Stamos, sum hon spældi saman við í filminum Femme Fetale fyri trimum árum síðani*

## HITLIST

### 15 tær bestu

ÚF

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Madonna | Hung Up |
| 2 | Pipar & Salt | Høm Høm |
| 3 | Black Eyed Peas | My Humps |
| 4 | Robbie Williams | Advertising Space |
| 5 | Shakira | Don't Bother |
| 6 | Poppkorn | Sjeikurin |
| 7 | Eminem | When I´m Gone |
| 8 | Páll Finnur Páll | Grannin |
| 9 | Kelly Clarkson | Behind These Hazel Eyes |
| 10 | Høgni Lisberg | Learn To Ride... |
| 11 | Sugababes | Push The Buttom |
| 12 | Petur Pólson | Timburmenn |
| 13 | Kanye West & Jamie Foxx | Gold Digger |
| 14 | The Darkness | One Way Ticket |
| 15 | The Pussycat Dolls | Stickwitu |

### Tjeklisten

DR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Madonna | Hung Up |
| 2 | TV-2 | De Førese Kærester på månen |
| 3 | Dolph ft. NBTB | Arghhh!!! |
| 4 | Outlandish | Look Into My Eyes |
| 5 | Nephew | Byens Hotel |
| 6 | Kent | Dom Som Førsvann |
| 7 | Green Day | Jesus Of Suburbia |
| 8 | Tina Dickow | Give In |
| 9 | Robbie Williams | Tripping |
| 10 | Mew | The Zookeper´s Boy |
| 11 | Black Eyed Peas | My Humps |
| 12 | Johnny Deluxe | Drenge Som Mig |
| 13 | Sugababes | Push The Button |
| 14J | oey Moe | Flip It |
| 15 | Franz Ferdinand | Walk Away |
| 16 | Depeche Mode | Precious |
| 17 | Cardigans | I Need Some Fine Wine... |
| 18 | C21 | The Spirit Of Christmas |
| 19 | Gorillaz | Dirty Harry |
| 20 | Alpine | Mondays Look The Same |

### Top of the Pops

BBC

| | | |
|---|---|---|
| 1 | The Pussycat Dolls | Stickwitu |
| 2 | Madonna | Hung Up |
| 3 | Sugababes | Ugly |
| 4 | Westlife | You Raise Me Up |
| 5 | The Strokes | Juicebox |
| 6 | Black Eyed Peas | My Humps |
| 7 | DHT ft. Edmee | Listen To Your Heart |
| 8 | Simon Webbe | No Worries |
| 9 | Oasis | Let There Be Love |
| 10 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 11 | Heard & Fitx ft. Abigail Bailey | I Just Can´t Get Enough |
| 12 | Girls Aloud | Biology |
| 13 | Franz Ferdinand | Walk Away |
| 14 | Arctic Monkeys | I Bet Your Look Good On The Dancefloor |
| 15 | Gorillaz | Dirty Harry |
| 16 | Sean Paul | Ever Blazin' |
| 17 | Charlotte Church | Even God Can't Change The Past |
| 18 | Tom Novy ft. Michael Marshall | Your Body |
| 19 | Craig David | Don't Love You No More |
| 20 | Rihanna | If It's Lovin' That You Want |

### Billboard

Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Mariah Carey | Don't Forget About Us |
| 2 | Chris Brown | Run It |
| 3 | Nelly & onnur | Grillz |
| 4 | D4L | Laffy Taffy |
| 5 | The Pussycat Dolls | Stickwitu |
| 6 | Nickelback | Photograph |
| 7 | Kayne West ft. Jamie Foxx | Gold Digger |
| 8 | Beyonce ft. Slim Thug | Check On It |
| 9 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 10 | Juetz Santana | There It Go |
| 11 | The Black Eyed Peas | My Humps |
| 12 | Ray J | One Wish |
| 13 | Three 6 Mafia & onnur | Stay Fly |
| 14 | Young Jeezy ft. Akon | Soul Survivor |
| 15 | Dem Franchize Boy & onnur | Think They Like Me |
| 16 | Eminem | When I'm Gone |
| 17 | T-Pain | I'm Sprung |
| 18 | Tringa ft. Kelly Rowland | Here We Go |
| 19 | Sean Paul | We Be Burnin' |
| 20 | Mary J. Blige | Be Without You |

sound

# SUPERMAN GER COMEBACK



Næsta ár fær superhetjan Superman comeback á hvíta tjaldinum. Seinasti filmurin um Superman var gjørdur í 1987, og tað var tann fjórði í eini rød við Christopher Reeve í høvuðsleiklutinum. Seinni gjørdist Reeve lamin, tá ið hann datt av einum hesti, og tað setti fyribils punktum fyri Superman á filmi. Nú verður trivið aftur í superhetjuna, og í nýggja filminum, Superman Returns, er tað Brandon Routh, sum skal spæla Superman. Leiklutin sum Lois Lane hevur Kate Bosworth, og Kevin Spacey spælir tann óndi Lex Luthor. Filmurin verður frumsýndur 30. juni næsta ár.

# PANDA HELT FØÐINGARDAG

Ein stóra pandabjørn í Puzhou í Kina helt beint fyri jól sín 25 ára føðingardag. Basi, sum pandabjørnin kallast, hevur livað leingi, tí samanborið við mannaaldur fylti hon hendan dagin 100 ár. Vanliga liva pandabjørnir í umleið 12 ár, men Basi hevur livað tívfalt so leingi sum miðalaldurin fyri sín javnlíkar. Basi er kend bæði í Asia og í USA. Hon var eitt skifti í San Diego á framsýningin í eitt hálvt ár, og hon var í 1990 maskottur fyri Asia Games, sum vórðu hildnir í Beijing.

*Mynd: Scanpix*



# BRITNEY ER IKKI GLOYMD



Hóast songkvinnan Britney Spears ikki hevur verið so virkin seinastu tíðina, hava fjepparnarnir hjá henni ikki gloymt hana. Yahoo kundi nú um dagarnar boðað frá, at Britney var tann persónurin, sum fólk ofast leitaðu eftir á internetsíðuni hjá teimum. Hetta er triðju ferð í fýra ár, at Britney er tann persónurin, sum fólk ofast vilja finna á leitimaskinuni hjá Yahoo á internetinum. Britney gjørdist fyrr í ár mamman, og hon hevur tí havt frí frá tónleikinum, men ætlanin er, at hon skal gera comeback næsta ár.